# Alfa Pilot siglir eftir ferðaætlanini

**Beinanvegin aftaná at verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum gjørdist veruleiki, fóru telefonirnar hjá báteaigarum í Klaksvík at ringja. Nógvir bátar sigla um Leirvíksfjørð, bæði við farmi, posti og fólki**

VERKFALL
*Solby A. Eliasen*



**Klaksvík:** Ein av hesum bátum er Alfa Pilot, sum eftir ynski hjá ferðafólki, ið nýta leiðina hvønn dag, er farin at sigla eftir galdandi ferðaætlan frá 8. apríl.

Sosialurin fréttir, at tað eru sera nógv fólk, sum fáa gleði av hesu leiðini nú, meðan Scania liggur.

Tað eru tó ikki so nógv fólk til allar túrarnar, men heldur eru tað túrarnir tíðliga um morgunin og seinnapartin og út á kvøldið, at nógv fólk eru við. Nógvir norðoyingar arbeiða ella ganga í skúla í Eysturoynni og Streymoynni, so tað er orsøkin til, at flest fólk eru hasar túrarnar.

Alfa Pilot siglur sum sagt eftir galdandi ferðaætlan frá 8. apríl á Leirvík, ikki Fuglafjørð sum Scania gjørdi.

# Kósin merkir ikki verkfallið

**– Fyribils merkja vit ikki so nógv til verkfallið, sigur Adrian Dalsá, stjóri á Kósini**

VERKFALL
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Adrian Dalsá sigur, at teir hava nóg mikið av fiski til alla vikuna og inn í komandi viku. Hann sigur eisini, at teir nýta Skipafelag Føroyar til at flyta fiskin úr Klaksvík.

– So fyribils er sum so ikki nakar stórvegis trupulleiki. Vit eru til arbeiðis akkurát sum vanligt, sigur Adrian.

Hann vísir eisini á, at øll skip og bátar kunnu koma inn á Klaksvík at landa, so tískil er ikki nakar vandi fyri, at eingin fiskur verður.

Tað er sera ójavnt, hvussu nógvan fisk Kósin flytur út úr Klaksvík um vikuna, men Adrian sigur, at tað plagar at liggja frá umleið 50 tonsum og uppeftir, líka til 150 tons onkuntíð.

# Maður dottin umborð á Kvikk

**Hósdagin kom Kvikk inn á Klaksvík við einum manni, sum var dottin umborð og hevði fingið skaða í høvdið**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Maðurin datt niðri í lastini, og fekk skaða í høvdið. Sosialurin fréttir frá Kvikk, at tað var ikki vandi á ferð. Skaðin var beint omanfyri eygað, so tað var á einum sjónligum stað, so av tí at teir lógu beint við Føroyar valdu teir heldur at koma inn við manninum, enn at fara at seyma sjálvir.

Maðurin varð fluttur á Klaksvíkar Sjúkrahús, har hann fekk 15 pentir. Og sum vanligt er, varð hann eisini kannaður fyri heilasjálvta.

Maðurin er útskivaður og hevur tað gott.




# Verkfallið rakar fiskivinnuna meint



*– Kongafiskamarknaðurin í Týsklandi er ikki so stórur, at hann ikki letur seg ávirka, um fleiri føroysk skip fara av landinum við heilum kongafiski. Hetta er sami marknaður, sum Fiskaviking á Tvøroyri hevur, sigur Martin Hentze, góðskuleiðari*

**Prísmunurin á kongafiski til fesk fløk og fryst fløk er einar 3-4 krónur í løtuni. Á Fiskavirking á Tvøroyri ber ikki til at arbeiða feskt, nú útflutningsmøguleikarnir eru so skerdir, og tí er djúpvatnstrolarin, Suðringur, á veg niður til Cuxhaven at selja. – Støðan er ógvuliga óheppin, sigur Martin Hentze, góðskuleiðari á flakavirkinum á Tvøroyri**

VERKFALLIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Eitt og hvørt verkfall rakar meint, og tað rakar mong, bæði á sjógvi og landi.

Nú at kalla eingin sigling er hjá Strandferðsluni millum firðir og sund, verður bæði fiskivinnan á landi og sjógvi meint rakt.

Tey virkir, sum serliga eru rakt í hesum døgum, eru tey, sum arbeiða fesk fløk. Hesi skulu avskipast sum skjótast, og tá ið strandfaraskipini ikki sigla, fæst fiskurin ikki til skipini, sum flyta fesku vøruna av landinum.

Hetta gongur aftur útyvir fiskaprísin, tí munur er á prísinum, virkini lata fyri fiskin, sum fer feskur av landinum og tað, tey lata fyri fisk, sum fer til frystingar.

Úrslitið er, at skip sigla av landinum við fiskinum, sum tískil ikki kemur til virkingar í Føroyum.

Hetta trýstir eisini kongafiskamarknaðin, sum eitt nú Fiskavirking á Tvøroyri hevur í Týsklandi.

### Suðuroyggin og Sandoyggin

Tvey økir, sum eru hart rakt av verkfallinum, eru Suðuroyggin og Sandoyggin, tí ein stórur partur av framleiðsluni á ávikavist Fiskavirking á Tvøroyri og Sandoy Seafood byggir á fesk fløk.

Martin Hentze, góðskuleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at verkfallið rakar meint, men einki er at gera við tað.

*framhald á síðu 7*



*framhald av síðu 6*

Hann vísir á, at nógvur fiskur er á marknaðinum, og tí kemur verkfallið neyvan at ganga nakað serligt útyvir arbeiðstímarnar hjá fólkinum, men meira útyvir møguleikarnar hjá virkinum at stýra framleiðsluni, soleiðis at mest fæst burtur úr, bæði til virkið og skipini, sum landa til virkið.

– Nú djúpvatnstrolarin, Suðringur, skuldi koma inn at landa, var prísurin, vit kundu geva fyri kongafiskin, einar 3-4 krónur lægri, enn hann annars hevði verið, um verkfall ikki var. Kongafiskurin, vit keypa, verður vanliga flakaskorin og sendur ísaður av landinum, men hetta letur seg ikki gera, nú útflutningsmøguleikarnir eru so skerdir.

Martin vísir á, at eingin fiskur fæst norður um Suðuroyarfjørð til Norrønu, nú strandfaraskipini liggja.

– Komandi hóskvøld kemur Skipafelagið suður higar, og tá kunnu vit aftur senda fekst av landinum, um tað passar soleiðis við landing, sigur hann.

### Suðringur til Týsklands

Suðringur er nú á veg til Cuxhaven í Týsklandi við 3100-3200 kassum av kongafiski og upsa, og óvist er, hvar Phoenix fer við sínum fiski, nú teir eru um at verða lidnir við túrin. Martin sigur, at Vesturtúgvan landaði 120.000 pund, meginparturin upsi, á Tvøroyri fríggjamorgunin. Teir skuldu ætlandi landa í Miðvági og so skuldi ein partur av veiðini flytast suður til Tvøroyrar.

– Men tað letur seg ikki gera, nú verkfall er, sigur hann.

Hann vísir á, at nú Vesturtúgvan landar á Tvøroyri so tætt uppundir vikuskiftið, er ivasamt, um Fiskavirking á Tvøroyri yvirhøvur kann bjóða uppá lastina hjá Phoenix.

Tað er eisini ein spurningurin, sigur Martin, um djúpvatnstrolararnir, sum fiska kongafisk, yvirhøvur vilja selja fyri 3-4 krónur minni fyri kg., enn teir plaga at fáa, tá ið alt er sum vanligt.

### Gongur útyvir marknaðin

Góðskuleiðarin sigur, at nú fleiri djúpvatnstrolarar kunnu væntast at fara til Týsklands við kongafiski, er als ikki óhugsandi, at hetta eisini fer at ganga útyvir marknaðin á feskum fløkum, tí hetta er sami marknaður og somu viðskiftafólk, sum eitt nú Fiskavirking á Tvøroyri hevur í Týsklandi.

- Kongafiskamarknaðurin í Týsklandi er nú heldur ikki so stórur, at hann ikki letur seg ávirka, um fleiri føroysk skip fara av landinum við heilum kongafiski.

Martin Hentze sigur, at verkfallið sostatt bæði rakar vinnuna á landi, sum er skerd fyri flutning av fiski millum oyggjarnar og útflutningsmøguleikar.

– Men verkfallið rakar eisini skipini, ið vanliga landa fisk, sum fer av landinum sum fesk fløk, sigur góðskuleiðarin at enda.

# Føroyskur trolari fekk lík í trolið

SJÓLÁTIN
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin fekk ein føroyskur trolari eitt lík í trolið, meðan roynt var á leiðini við Svalbard.

Tíverri hevur ikki eydnast okkum at finna fram til, hvør trolarin er, hóast vit hava spurt okkum fyri, bæði hjá MRCC-Tórshavn og í Bodø í Noregi.

Tað var, meðan trolarin royndi við »Hopenjupet« út fyri Svalbard, at líkið lá í trolposanum, tá ið teir háladu.

– Norskt vaktarskip var av tilvild á leiðini, tá ið norska vaktartænastan fekk boðini, sigur Andreas Rødø, sum starvast hjá sýslumanninum á Svalbard.

Vaktarskipið átók sær at flyta líkið inn til Longyearbyen á Svalbard við tyrlu.

– Líkið er nú flutt av Svalbard til Tromsø og á Universitetssjúkrahúsið, og har skulu tey royna at finna út av, hvør tann sjólátni er, sigur Røde.

Hann vísir á, at tað er føst mannagongd, tá ið lík soleiðis verða funnin á havinum, at tey verða kannaði til lítar.

### Eingin saknaður

– Vit vita ikki um nakran, sum er saknaður í økinum seinasta árið, sigur Rødø.

Sýslumansskrivstovan á Svalbard hevur kortini ein lista yvir trý saknaði, sum talan kann vera um.

– Men hetta er yvir eitt stórt øki og yvir langa tíð, sigur Andreas Røde á sýslumansskrivstovuni á Svalbard.

Tveir trolarar hava roynt í Hopendýpinum seinastu dagarnar, tað eru rækjutrolararnir Kappin og South Island, sigur Vaktar og Bjargingartænastan. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa uppspurt hvør at trolarunum fekk líkið í trolið, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Ert tú bitin av web's :-)



Ert tú internetforritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær.

Sansir eru eitt samskiftisvirki, har marknaðarføring á internetinum fær ein alsamt størri leiklut.

Vit eru í millum annað í ferð við at menna eina CMS-skipan (Content Management System), ið hevur víst seg at vera væl umtókt. Vit arbeiða við dynamiskum loysnum, sum eru skraddaraseymaðar til virki og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving, ert datamatikari, datanom ella líknandi. Tú hevur kunnleika til ASP og SQL, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til COM-komponentar og dugir at handfara Visual InterDev. Royndir á økinum eru eisini ein fyrimunur, men ongin treyt.

Tú fært góðar møguleikar fyri menning – bæði fakliga og menniskjaliga. Vit kunnu bjóða tær skeiðmøguleikar í tann mun, sum tað hóskar inn í arbeiðsgongdina.

Tú skalt vera ágrýtin, røkin og líka arbeiðssamur sum ein vespa. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.

Send okkum umsókn við prógvum og møguligum viðmælum innan 1. juni. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa meira at vita um starvið.

SANSIR

PF SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1095 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur seg av heildar-samskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina ímynd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo